# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Johanna Petersen í Rituvík** andaðist í heiminum mánadagin, 91 ára gomul. Kistan fer úr heiminum í kirkjuna mikudagin klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Rituvíkar kirkju hósdagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Johannu, kunnu lata Rituvíkar kirkju eina peningagávu. Konta í peningastovni.

**Páll Nolsøe**, ættaður úr Vági, andaðist í Keypmannahavn mándagin 19. mai, 80 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Dagurin**
**22. mai. Castus**, deyður umleið ár 250. Saman við øðrum brendur á báli í Kartago.

## ORÐAFELLI

### Toskagildi

Skemtilig vending, tá ein skattgjaldari verður innkallaður til skattavaldið, tá hesin ikki vil góðkenna sína sjálvuppgávu.

Vendingin finst m.a. í Berlingske Tidende hin 16. apríl 1944 og verður eisini brúkt saman við vendingum sum til dømis "klaptoskur" í týdninginum dummur hundur.

Tá ein við toskagildi, uttanfyri skattavaldið, plagdi at eta toskarnar, er meiningin í hesum serliga týdninginum helst hon, at ein verður róptur niðan til líkningarmyndugleikarnir fyri at eta sínar egnu toskar – býttisskap – í seg aftur.

*(Kelda: Bevingende ord eftir T. Vogel-Jørgensen)*

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Realskúlanæmingar í 1960

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Realskúlanæmingar eru í føðingardag hjá Liljuni B. Nielsen í oktober 1960.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesar myndir, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Tórgerð Hentze*



*F.v.: Birgir Due Sørensen, Súsanna Thomsen (Dam), Hans Eli Dahl og Mortan Mortensen (mynd nr. 448)*



*F.v.: Árni Nielsen, Sverri Jespersen, Hans Eli Dahl, Birgir Due Sørensen og Mortan Mortensen (mynd nr. 447)*

Lesið Sosialin -so eru tit við!